

*Lønin er syndarlig, men eg hyggi meiri eftir fyrimununum. Hetta er ein tloga sum vinnandi betalir seg aftur, sigur Janus Ellendersen í Hvalba*

er fyri fleiri føroyingum í ensku oljuvinnuni, eisini hjá øðrum reiðarium, ti tað er helst bara ein spurningur um tíð, áðrenn teir finna út av, at føroyingar kunnu brúkast og at einki er til hindurs fyri, at hava teir umborð, heldur hann

## 28 dagar í sama stað

Reiðaríið er lítið, men tað er í menning. Tað eigur eig ur triggjar togarar, tað eru skip sum skipa borpallar stað úr stað.

Og viðhvørt er teinurin langur. Janus fortelur, at í løtuni er eitt skip hjá teimum í ferð við at toga ein borpall heilt úr Murmansk í Norðurrusslandi, líka til Bombay í India.

Reiðaríið eigur og leigar eisini 10 „Stand By" skip og tað er einum sovorðnum, Janus siglur við.

Teir eru 12 mans við. Teir eru umborð í fýra vikur og hava frí í fýra vikur. Tvs, at tvær manningar eru til hvørt skipið.

„Stand By" skip eru skip sum liggja til reiðar við borpallarnar skuldi nakað óhapp hent.

– Vit sleppa viðhvørt at standa okkara royndir. Tað kemur fyri, at teir tvætta dukkur fyri borð og rópa so neyðarróp.

Viðhvørt stendur seðil á dukkuni sum sigur, at henni bagir tað og tað.

Okkara uppgáva er so at bjarga dukkuni og læknin umborð skal so „viðgerða" hana.

Uppi á pallinum standa teir við steðgiuríð og kanna, hvussu gongst. Og teir eru skjótir at finnast at, gongur tað ikki nóg skjótt.

Tíbetur eru teir ongantíð slopnir at royna seg av álvara.

Janus sigur, at tíðin umborð fellur long. Hann er í teirri heppnu støðu, at hansara skip siglir millum pallarnar og bíðar, meðan skipið, sum hevur fasta vakt hjá pallinum, er í havn og skiftir manning og kanska verður umvælt.

– At skula liggja stillur undir einum palli í 28 dagar, man verða ótrúliga langligt, sigur hann.

## Til Føroyar at umvæla

Janus Ellendersen sigur, at næsta stigið verður at fáa skipini til Føroyar at umvæla.

Tað er ofta nógv at gera við skipini og mangan er nógv styttri at sigla til Føroyar, heldur enn til Aberdeen.

Til Hetlands fara teir ikki, ti har er ov dýrt.

Eru vit kappingarførir, ivist eg ikki í, at vit høvdu kunnað fingið skip at umvælt í Føroyum. Tað er bara at sannføra teir um, at tað er tað rætta.

Janus sigur, at manningini hevði dámað tað væl, ti skattalógin sigur, at teir sleppa undan gjalda skatt alt árið, eru teir bara eina ferð í útlendskari havn, so tað hevði verið ein veldugur fyrimunur hjá teimum.

## Gera tað lættari

Janus Ellendersen sigur, at føroyingarnir og reiðaríið hava tosað um at finna eina skipan so at tað mest møguligt verða føroyingar sum avloysa føroyingar umborð.

Kunnu vit avtala, at vit sigla tvær og tvær mánaðir, heldur enn ein og ein, kann tað í mongum førum gera tað skjótari at fáa siglingstíðina.

Men hetta er ikki so eintalt, partvís ti, at lóg áleggur monnum at verða í landi minst seks dagar, hvønn mánaða, fyri at verja teir, og partvís ti, at borpallarnir fylgja gjølliga við, hvør er mynstraður umborð hvørja ferð og teir tala at, um sami maður er umborð tveir túrar á rað.

Men vit fara at royna at senda felags umsókn um at fáa undantak, sigur Janus Ellendersen.

Eru vit samdir, skuldi einki verið til hindurs fyri tí, heldur hann.

Janus veit ikki, hvussu leingi hann verður verðandi í skipinum. Tað veldst um so langt, men fyribils verður hann eitt sindur afturat.

Ein stórur fyrimunur hevði verið at flutt bústaðin til Skotlands, tí so slapp hann nógv bíligari í skatti. Tað bíðar hann tó eisini við, ti tað eru altíð fyrimunir og vansar við øllum, heldur hann.


# Skósølan

SKOfus[5] hjá ...

# JÓAN JAKKU

*Hygg ikki bert í príslistan...*

*Hygg eisini inn...*

Vit hava nógvar aðrar skógvar í at velja

Skósølan hjá JÓAN JAKKU

SKOringen

Vágsbotnur - Tórshavn



# AKKUMOLATORAR

Vælumtóktu amerikonsku akkumolatorarnir

**DAYSTARTER og NAVIGATOR**

fáast nú í Føroyum. Eftir drúgvar royndir – heilt síðani 1946 – hava teir prógvað sítt virði sum teir røttu til

**SKIP, BÁTAR, PERSÓNBILAR, LASTBILAR, BUSSAR, KOMPRESSARAR og annars til ALLAR STØRRI MASKINUR**

5 ÁRA GARANTI: Persónbilar
3 ÁRA GARANTI: Bátar, bussar, lastbilar, st. maskinur
18 MÁN. GARANTI: El-koyristólar, lyftir, gólvreinsimaskinur

**DAYSTARTER FØROYAR**

v/ Oddur H. Lamhauge
Lyngvegur, 620 Runavík, Telf./Fax 48844



**Golf diesel**

árg. 84, í góðum standi, til sølu.

Tlf. 17723 - 15839



**PIZZA-VINIR**

**PIZZARIA**